**variant**

**Galvaniseraðir viðfestisvognar**



Eykalutir, útgerð, søla og tænasta. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

**Kaj Andreasen & Co**

Heilsøla · smásøla · umboð
Tel 31 56 00
www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

**Lesið Sosialin**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3686,** Sp/f Klaksvíkar Byggivirki Lastbilar, 700 Klaksvík.
**Navn:**
**Nýtt navn:** Sp/f Klaksvíkar Byggivirki Lastbilar
**Nevnd:**
**Innkomin sum nevndarformaður:** Sjúrður Josephsen, Jørundsgøta 12, 700 Klaksvík
**Farin frá sum nevndarformaður:** Páll Josephsen, Marknavegur 4, 700 Klaksvík
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Sjúrður Josephsen, Jørundsgøta 12, 700 Klaksvík
**Innkomin sum stjóri:** Hjalmar Josephsen, Kjalarskákið 5, 700 Klaksvík

Skráseting Føroya
tann 03. mai 2005

Kristin Balle

---

**Heimarøktin og Serforsorgin**
**Serstovnadeildin**
**Sambýli Líknargøta 1**
**620 Runavík**

# Pedagogur

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnum undir tí við fyribilstænastu á Sambýlinum á Líknagøtu 1 í Saltangará, er eitt pedagog starv leyst til setan 1. juni 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar og vikuskiftisarbeiði.

Á Sambýlinum á Líknagøtu búgva 3. ungir menn við autismu. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum og verandi starvsfólkum. Tað krevur m.a., at tú er førur fyri at gera kropsligt arbeiði, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.s.fr.

**Løn- og setunartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27,28 og 30 til 33 eftir lønartalvu frá 01.10.04

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi 3 & 6 í Runavík, ið eru undir somu leiðslu sum Sambýlið á Líknagøtu 1. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjara, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving verða settir í starv.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2005 kl. 12.00

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121.

Umsóknir skulu stílast til:

**Bústovnin á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 6
Fo - 620 Runavík

---

**Klaksvíkar kommuna**

## Planta eitt træ

Klaksvíkar Býráð vil aftur í ár bjóða nøkur trø at planta í urtagarðarnar.

Tey, sum ynskja at fáa ein plantupakka frá Klaksvíkar Býráð, verða biðin um at koma í hølið hjá Býargartnarinum undir skýlinum við fótbóltsvøllin leygardagin 7. mai millum klokkan 10.00 - 13.00.

Bert ein pakki er til hvørt húski og mongdin er avmarkað.

Trøini verða at fáa á staðnum.

**Klaksvíkar Býráð**

Sosialurin 341800

---

# KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI

*ein virkin skúli*

**Í August 2005 byrja hesi skeið á Klaksvíkar Sjómansskúla.**

**SJÓVINNUFLOKKUR:**
Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til skipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verður eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjóðringar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varðar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn í sjóvinnuflokkin. Fyri teir, sum seinni ætla sær víðari, er tað ein stórur fyrimunur at hava gingið í sjóvinnuflokkinum áðrenn, tí her verður grundarlagið til fleiri tíðandi lærugreinirnar lagt.

Tvey pláss eru eftir til sjóvinnuflokkin.

**SKIPSKOKKASKEIÐ:**
Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og reinføri, at proviantera, matgerða, baka og borðreiða.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstihjálp.

Skeiðið varðar í 20 vikur. Skeiðið, ið byrjar í august 2005, er fullteknað men nýtt skeið byrjar aftur í januar 2006. Har eru nøkur pláss eftir.

**SKIPARAR:**
Nýtt skeið til skiparar byrjar í januar 2006. Til hetta skeiðið eru bert nøkur heilt fá pláss eftir.

Útbúgvingin til skipara varðar í 1 1/2 ár. Upptøkutreytir til skiparar er treytað at víðkaðari fráfaringaroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskt, danskt, enskt, rokning/støddfrøði, alis-evnafrøði við próvtali í minsta lagi 6 ella javnmett hægri prógv. Ella hevur gingið á sjóvinnuskúla og staðið dugnaskaparskeið í sigling.

**Umsøknarblað:**
Umsøknarbløð fáast við at ringja á tel 456128. Síðsta freist at tekna seg er 20.mai 2005.

Sosialurin 341800

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2662,** Sp/f B.O.S. Faroe, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Francesco Doroteo Vroon, Dorpslein 17, 4574 RD Zuiddorpe, Holland (nevndarformaður) Poul Johannes Gunleif Johannesen, Marknagilsvegur 99, 100 Tórshavn (nevndarlimur) Torleivur Magni Mikkelsen, Í Svanga 28, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Torleivur Magni Mikkelsen, Í Svanga 28, 100 Tórshavn Innkomin sum likvidator: Bjørn á Heygum,adv., Bøgøta 16, 100 Tórshavn
**Átekning:** Felagið er tann 11.04.2005 farið í sjálvbodna likvidatión

Skráseting Føroya
tann 03. mai 2005

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

---

# Kvink

## *søkir eftir bókhaldara*

**Vit vænta, at tú:**
- Ert álítandi
- Hevur royndir innan bókhald
- Samstarvseginleikar
- Miðnáms ella skrivstovuútbúgving

**Løn:**
Tímaløn

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú senda tína umsókn til:

**Kvink**
**Att: Bókhald**
**Postbox 3058**
**110 Tórshavn**
**Føroyar**

*Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Regin W. Dalsgaard á telefon 596061*

**Ella til rwd@isuus.com**

*Kvink er eitt felag, sum Dynamic Paper P/F, Emperi Tech Sp/F og ISUUS Mobile Sp/F eiga saman. Vit arbeiða innan útvikling av ritbúnaði, sølu og tænastu. Vit eru í ferð við at víðka um virksemi í Føroyum og uttanfyri Føroyar.*